

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 01 - 2012

# ES gevast at keypa olju úr Iran frá juli

Tær europeisku stjórnirnar fara helst at seta í verk bann móti at innflyta olju úr Iran. Men hetta verður neyvan fyrr enn um knapt eitt hálvt ár. Hetta siga diplomatar í ES sambært Ritzau. Tíðin fram til juli skal brúkast til at brúka upp teir verandi sáttmálarnar verður sagt. Onkur diplomatur vil vera við, at ein avtala um hesa gongdina fer at verða gjørd ein av komandi døgunum. Tað eru sendiharrarnir í ES, sum skulu semjast um eina avtalu, áðrenn uttanríkisráðharrarnir í ES møtast mánadagin. Tá skulu ráðharrarnir taka støðu til nýggj tiltøk móti prestastýrinum í Teheran fyri at fáa tað at gevast við sínum royndum at framleiða kjarnorkuvápn. Sambært tíðindunum eru londini ójøvn á máli um, hvussu long freistin skal vera. Nøkur halda tríggjar mánaðir, onnur eitt ár, og hesi seinastu eru m.a. Grikkaland, Italia og Spania, sum er sera bundin at oljuinnflutningi úr Iran. ES keypir í dag umleið 450.000 tunnur av olju frá Iran um dagin, og tað merkir, at londini í Europa saman við Kina og India eru mest týðandi keyparar av iranskari olju. Teir fyrstu níggju mánaðirnar í 2011 keypti Grikkaland 34,2% av síni oljunýtslu úr Iran, Spania 14,9% og Spania 12,4%. Tað er annars ikki minst USA, sum roynir at fáa Vesturheimin at standa saman um tiltøk móti Iran, sum hinvegin hevur hótt við at stongja tað so týðandi Hormuzsundið. Tað kann so aftur fáa álvarsligar fylgur fyri heimsbúskapin, nú ein sera stórur partur av oljunýtsluni hjá fleiri av heimsins mest týðandi búskapum verður fluttur gjøgnum Persaraflógvan.

